

# USA steðgar nú allari oljuleiting í Arktis

**Jógvan Hugo Gardar**

21.10.2015 - 09:33

Oljan.fo

Obama-leiðslan hevur nú tikið støðu til at nú skulu ikki fleiri leitiloyvir latast til oljuleiting í Arktis, skrivar tíðindastovan Ritzau.

Greenpeace, ið stríðist móti oljuvirkseminum í Arktis, metir at hendan avgerðin bara er tann fyrsta, og at tað næsta verður at USA steðgar øllum oljuvirksemi í Arktis.

Fyri stuttum boðaði oljurisin Shell fra at tey gevast við oljuvirkseminum í Arktis, og nú hevur amerikanska stjórnin bða fra at tey avlýsa søluna av leitiloyvum í Arktis sum annars skuldu seljast í 2016 og 2017.

Í einum tíðindaskrivi fra Greenpeace verður sagt at hetta í veruleikanum merkir at USA velur at steðga øllum oljuvirksemi í økinum.

Samstundis sum USA velur at steðga á nú, so heldur oljuleitingin fram aðrastaðni í Arktis, millum annað uttanfyri Grønland. Greenpeace sigur í tíðindaskrivinum at amerikanska

abgerðin nú leggur tryst á grønlendska heimastýrið fyri at fáa tey til eisini at steðga leitivirkseminum.